# SÓLJUGARÐUR

## Pedagogar søkjast

***Vísandi til dagstovnalógina søkir Sandavágs kommuna eftir pedagogum til Sóljugarð. Talan er bæði um størv í vøggustovu og í barnagarði. Størvini verða sett eftir avtalu. Barnagarðurin er í 5 eindum við vøggustovu, barnagarði og frítíðarheimi. Stovnurin er vanliga opin frá kl. 7.30 til 17.00.***

**Í dagliga arbeiðnum leggja vit m.a. stóran dent á :**

- Trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum
- At seta okkum inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- At skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- At hava gott samstarv bæði við starvsfólk og foreldur
- At tú m.a. verður við til at orða eina námsætlan

Vit hava sera góðar umstøður, bæði uttandura og innandura.

**Okkara ynski er:**

- At tú hevur góð samstarvsevni
- Hevur áræði at geva børnunum avbjóðingar í gerandisdegnum
- At tú vilt vera við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi

**Lønarviðurskifti**

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag (www.kaf.fo) og fylgir lønarstigunum frá 11 til 17.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Caritu Björklund, leiðara á tel 333 930 lok. 10

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Sandavágs kommunu ella Sóljugarði, 360 Sandavágur, í hendi í seinasta lagi **10. apríl 2007.** Viðmerk á brævbjálvan: "Námsfrøðingur".

# SERNÁMSDEPILIN

## Talilærari

### Vit sóknast eftir einum talilærara til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsstað og uppgávur**

Setanin er í Sernámsdeplinum, men talilærarin fer at talivenja og gera talimennandi arbeiði við børnum undir skúlaaldur í venjingarhølum á 2 dagstovnum ella øðrum egnaðum hølum í Tórshavnar kommunu, hagar børn verða tilvíst til venjingar í talibólkum. Í minni mun kann vera talan um venjing við einstøkum børnum, ið hava heilt ávísar talitrupulleikar, ið krevja eistaklingaviðgerð.

Í samstarvi og í samráð við fakfólk í Sernámsdeplinum og stovnsleiðarar fer talilærarin at vegleiða starvsfólkum og avvarðandi at børnunum í á ein munagóðan hátt at vera málsliga mennandi um børnini.

Arbeiðsstað og sernámsfrøðiligar uppgávur kunnu tó broytast eftir umstøðum og tørvi í mun til broytingar í sernámsfrøðiligu skipanini, ið Sernámsdepilin skal virka í.

**Arbeiðstíð**

Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Undirvísingartíð verður roknað eftir avtalu um arbeiðstíð hjá fólkaskúlalærarum.

**Løn**

Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, lønarflokkur 23 – 2 til 30 – 3.

**Førleikakrøv**

Serlæraraútbúgvin pedagogur ella fólkaskúlalærari við talu/ málmenning sum sergrein ella á annan hátt útbúgvin og royndur umsøkjari, ið hevur førleika at talivenja við børnum og at luttaka í talimennandi arbeiði annars. Audiologopedur við royndum at arbeiða við smábørnum er eisini skikkaður at søkja starvið.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møguligum viðmælum skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13. apríl 2007.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali- hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

Tórshavn tann 23. mars 2007.

**Sernámsdepilin**

Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
e-postur: sernamsdepil@snd.fo

# EL-SERVICE

FO-480 Skála · Faroe Islands · www.el-service.fo
Tlf. 47 19 00 · Fax. 47 19 01 · el-service@el-service.fo

## Skrivstovulærlingur

Til skrivstovu okkara sóknast vit eftir skrivstovulærlingi at byrja skjótast gjørligt.

**Vit vænta at tú hevur:**

- FHS prógv ella líknandi
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Skrivlig umsókn skal sendast til:
**EL-SERVICE P/F**
**Bryggjan 15**
**480 Skála**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til El-Service á tlf. 47 19 00.

Á El-Service arbeiða uml. 40 fólk, tey flestu hava el- og maskinútbúgving. Vit arbeiða við framleiðslu, installatión, eldsløkkiútgerð og offshore. Størsti parturin av okkara veitanum og framleiðslu fer til útflutnings. Vit leggja stóran dent á góðsku og eru ISO-9001 góðkent.

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 37 11 33 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Bioanalytikarar

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum fyri bioanalytikarar í tíðarskeiðnum 1.juli – 31. august 2007.

Størvini eru fulltíðarstørv við tilkallivakt frá heiminum.

Løn sambært sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til leiðandi bioanalytikara Sannu Mortensen tlf. 37 11 33 lokal 114.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
att. umsjónarmaðurin
Postboks 51,
810 Tvøroyri.

ella

ssh@ssh.fo

Umsóknarfreist 9. apríl 2007.

# TIL SØLU



Ein AWI-27 fót bátur við fiskiloyvi, hevur 120 hk Sole motor, línuspæl, 2 heilautomat. + 1 hálvautomat. snellu, radara, ekkolodd, GPS-ara, sjálvstýrara o.a.

Prísur kr. 370.000,-

*Tlf.: 444205 - 221744*

# FÓLKAFLOKKURIN

Eysturoyar Fólkaflokkur heldur ársaðalfund í skúlanum á Eiði hóskvøldið 12. apríl 2007 kl. 19:30.

Løgtings- og Landstýrismenn luttaka

EYSTUROYAR FÓLKAFLOKKSFELAG

# Málningaframsýning hjá Lions á páskum

Árliga málningaframsýningin verður 1. og 2. páskadag (8. og 9. apríl) í Runavíkar skúla. Tey, ið hava hug at luttaka, skulu siga frá skjótast gjørligt og áðrenn 28. mars á telefon 44 30 03 (Jógvan). Plássið er avmarkað.

**LIONS CLUB EYSTUROY**

# Sethús á Tvøroyri til sølu

Húsini standa á Hvítanesi við sera góðum útsýni. Grunddøkið er uml. 950 fermetrar. Til húsini hoyrir ein stór garaga. Tey verða seld partvís møbleráð, um áhugi er fyri hesum.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 37 11 22 ella 27 26 22**